

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 06 - 2012

# Nógvir føroyingar partur av boriverkætlan

Dagurin 17. juni 2012 kann gerast søguligur. Henda dag varð borurin settur í føroysku undirgrundina fyri áttandu ferð í royndini at finna føroysku oljuna. Boripallurin Cosl Pioneer fer at bora næstu 4 til 5 mánaðirnar. Og í oktober ella november vita vit, um Statoil í síni triðju boriroynd rakar við lønandi oljukeldu og letur upp fyri tí føroyska oljuævintýrinum. Pallurin kom inn á føroyskt sjóøki leygardagin. Fyrireikingarnar hava gingið sum fótur í hosu, og sunnudagin varð borurin settur í undirgrundina. Atlantic Airways, sum stendur fyri tyrluflúgvingini til og frá pallinum umframt flutninginum millum Føroyar og Noreg, vitjaði pallin í leygardagin í sambandi við venjing. Nú kemur so gongd á henda partin av arbeiðinum á Brugdumiðinum eisini. Føroyingar eru við í nærum øllum liðum, umborð á pallinum arbeiða einir seks føroyingar, teoir manna standbyskip á leiðini og standa fyri tyrluflutningin umframt at standa fyri arbeiðinum á útgerðarstøðini í Runavík. Oljan.fo, sum fer at fylgja boringini komandi mánaðirnar, kann her vísa fyrstu myndirnar av kinverska boripallinum í føroyskum øki. Tær eru frá Tyrlutænastuni hjá Atlantic Airways. Myndir Cosl Pioneer tikin frá tyrluni hjá Atlantic Airways. Á myndunum sæst eisini AW139 tyrlan á dekkinum. Myndir - Tyrlutænastan